# BÁTAR TIL SØLU

MIRAMISHI XL 45-fót



45x15 fót · árg 2003 · Motorur 660 HK Caterpillar
Ferd 25 míl · Báturin er sum nýggjur

**Hópin av glastrevjabátum til sølu. Ring og frætt nærri**
**Sí www.bosdalafossur.fo**

**S/pf Bósdalafossur.fo**
Tel 333101 · Fartel. 286414

Atlantic Petroleum

# Vaskifólk

Søkt verður eftir einum tilkomnum fólki at vaska á skrivstovu okkara tvey kvøld um vikuna, at byrja skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til okkara á tlf. 350100, ella á telduposti petroleum@petroleum.fo

**Atlantic Petroleum**
Boks 1228
Gongin 9
Tórshavn

# Felags foreldrafundur

Felags foreldrafundur verður **mánakvøldið 30. okt. kl. 19** í fimleikahøll skúlans.

**Skrá:**

1. **Ársfrágreiðingin 2005/2006** verður løgd fram, og høvi verður at gera viðmerkingar.
2. **Fólkaskúlin: Hvussu náa vit góðum úrslitum?**
   Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag og Jan Mortensen, leiðari í Vinnuhúsinum, leggja fyri

   Høvi verður eisini at hoyra næmingar framføra sang og tónleik.

Øll eru vælkomin!

**Fuglafjarðar skúli og skúlastýrið**



# Løgfrøðingur

Tórshavnar kommuna søkir eftir løgfrøðingi til spennandi starv á stjórnarskrivstovuni.

**Starvið**
Sum løgfrøðingur ráðgevur tú borgarstjóra, stjórn og starvsfólki, og tú ert við til at menna mannagongdir og fyrisitingarliga førleikan í kommununi. Í ávísan mun málsviðger tú og samskiftir við borgarar, virkir og myndugleikar, í serligum málum, ið eru latin stjórnarskrivstovuni at avgreiða.

Tórshavnar kommuna bjóðar tær eitt starv í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi, við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum, ið geva tær góðar møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Setanin**
Sum umsøkjari mást tú hava lokið løgfrøðisligt embætisprógv. Vit ynskja, at tú hevur viðkomandi royndir og helst innan almenna fyrisiting. Tú mást duga væl at samskifta og samstarva bæði innan- og uttanhýsis.

Vit seta starvið skjótast til ber og løna sambært sáttmálanum millum BLF og FMR. Vit kunnu bjóða setan sum ráðgevi, um førleikin og royndirnar eru til tess. Vit bjóða eisini skeið og eftirútbúgving.

Vit kunnu greiða tær meira frá starvinum, um tú ringir til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, tlf. 302010. Tú kanst eisini spyrja okkara fráfarandi løgfrøðing Eyðbjørn Larsen.

**Umsókn**
Tiltalar hetta teg, so send eina umsókn saman við viðmælum og prógvum til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn. Umsóknin skal vera okkum í hendi seinasta lagi 30. oktober 2006, kl. 12.00.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**



sozo

# Kundi tú hugsað tær at arbeitt við ungdómi?

– so hava vit eitt avbjóðandi starv til tín

KFUM og KFUK søkja medarbeiðara, sum hevur hug at arbeiða millum ungdóm í einum fjølbroyttum kristiligum umhvørvi.

**Arbeiðið umfatar**
- leggja ungdómsarbeiðið til rættis
- skipa fyri tiltøkum fyri børn og ung
- røkja dagliga arbeiðið á skrivstovuni

**Vit vænta**
- tú ert álítandi og trúgvandi
- tú dugir at arbeiða við børnum og ungum
- tú kennir til sjálvboðið kristiligt arbeiði
- tú kanst samstarva við onnur
- tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur áræði at taka nýggjar tættir upp

**Vit bjóða**
- eitt avbjóðandi og spennandi starv
- fjølbroyttar og mennandi uppgávur
- góð arbeiðsviðurskifti og góða løn

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til KFUM og KFUK; Louisu Niclasen, skrivara, á tel 31 19 28 ella fartelefon 21 18 24.

**Umsókn og freist**
Skrivlig umsókn við ummælum og skjølum skal vera okkum í hendi innan 15. nov. 2006.

KFUM og KFUK í Havn eru tveir savnandi ungdómsfelagsskapir við nógvum virksemi fyri børn, ung & vaksin, sum umfatar Várgleði og onnur tiltøk umfatar Sound of GloryTenSing, sum er kór, dans & drama. Sí meira á www.soundofglory.com

**KFUM og KFUK**
Varðagøta 9
100 Tórshavn
tel 31 19 28